## Robson verður landsliðsvenjari

Bryan Robson, sum í drúgt áramál bar siðvandu troyggjuna við 7-talinum í Manchester United, hevur sagt ja-takk til at royna seg sum thailendskur landsliðsvenjari. Robson, sum í dag er 52 ára gamal, hevur áður verið venjari hjá Middlesbrough, Bradford og WBA, men í ongum av førunum gjørdist talan um tey heilt stóru úrslitini. Í Thailandi hevur hann skrivað undir fýra-ára langa sáttmála, har málið er at fáa landið til HM-endaspælið í 2014.



## Nýtt rættarmál móti »Fjolsinum«

DBU og Parken hava nú reist endurgjaldskrav móti áskoðaranum, sum í fyrraárið leyp inn á vøllin eftir dómaranum, tá Danmark og Svøríki spældu í Parkini. Parkin hevur reist endurgjaldskrav upp á sjey milliónir fyri mista inntøku, meðan DBU kreuvr 1,9 milliónir. Áskoðarin varð í desember mánaði í 2007 dømdur 20 daga fongsul fyri harðskap móti týska dómaranum, Herbert Fandel.

## Stjørnan-VÍF 33-19 (16-9):

# VÍF vísti góðar taktir

**Talan gjørdist um væntaða trygga sigurin hjá Stjørnuni, men í løtum vísti VÍF, at liðið væl kann mennast til nakað stórt**




Jákup Mørk

Við Stjørnuni í Klaksvík var talan ikki um léttastu hugsandi byrjanina hjá blaðunga VÍF-liðnum, sum nú aftur roynir seg í Sunset-deildini.
Fyrstu lítlu løtuna av dystinum tóktist hetta tó ikki at nerva tað allarminsta. Helst hildu tær hjá heimaliðnum, og sigurin bara skuldi koma av sær sjálvum, men tað vildu gestirnir tó ikki.
VÍF loypti hvøkk á alt og øll, tá teir eitt skifti vóru á odda 5-2, men so raknaðu tær hjá heimaliðnum við. Time-out'ið, sum varð tikið, hevði eisini ta avleiðing, at gestirnir brádliga fóru at hugsa um, hvat tær gjørdu, heldur enn bara at spæla, og so fingu premieru-nervarnir veruliga fatur á unga VÍF-liðnum.
Talan gjørdist at enda eisini um ein tryggan sigur hjá Stjørnuni, sum fyrst og fremst hevði veldugar fysiskar fyrimunir móti blaðungu mótstøðuni. Og við níggju málum og einum góðum hugburði annars, sýndi Valentina Siciu eisini, at hon kann verða góður fongur hjá Stjørnuni, sum aftur í ár strembar eftir gullinum.
Tað gera tær hjá VÍF ikki, men minni kann eisini gera tað.
Setningurin hjá liðnum er fyrst og fremst at halda sær í deildini, og skal metast eftir fyrstu royndini, so er nógv og gott tilfar at byggja á. Royndirnar og kropsliga styrkin koma við størru avbjóðingunum, sum nú standa fyri framman, og megnar liðið samstundis at halda fast um góða hondbóltsskilið, sum ofta slapp framat leygardagin, er talan á ongan hátt um ómøguliga uppgávu.




Tað gav ikki Stjørnuni nakrar serligar trupulleikar, tá VÍF vitjaði leygardagin. Men unga VÍF-liðið vísti í løtum, at stórt potentali býr í spælarunum

Mynd: Norðlýsið

### Fakta

**Stjørnan-VÍF 33-19 (16-9)**
**10 min:** 4-5
**20 min:** 11-7
**40 min:** 21-16
**50 min:** 25-17
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Valentina Siciu 9(3), Simona Petersen 6(1), Joan Midjord Djordjevic 3, Una Olsen 3, Hanna Mikkelsen 2, Durita Mikkelsen 2, Ella Petersen 2, Bára Skaale Klakstein 2, Maria við Neyst 2, Edith Hansen 1, **Judith Hansen 1**
**VÍF:** Halla Midjord 6, Liljan Djurhuus 6, Rannvá á Rógvu 2, Heidi Joensen 2, Rakul Joensen 1, Tóra Seloy 1, Finngerð Jensen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3
**Útvísingar:** Stjørnan 3, VÍF 2
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

## VB-Neistin 21-25 (11-14):

# Orkan á muni

**VB hevði leingi gott tak á Neistanum, men seinastu løturnar av báðum hálvleikunum vísti, at Neistin hevði neyðuga yvirskotið**




Jákup Mørk

Uttan útlendingar og við hópin av lokalum spælarum stóð VB til reiðar at byrja Sunset-kappingina, tá Neistin kom á vitjan leygardagin. Nógv hevur verið tosað aftur og fram um, hvussu styrkin hjá VB mundi verða, nú tey skriva ár null eftir Daivu, men skal metast eftir fyrsta dystinum, so er hetta kanska ikki verri enn ilt.
Neistin er kanska heldur ikki heilt so sterkt, sum liðið var í fjør, men enn telur liðið nakrar av fremstu spælarunum í landinum, men hóast hetta, so hekk VB væl og virðiliga vi største partin av dystinum.
Fyri steðgin hevði VB eisini munin í fleiri umførum, men stutt undan steðginum skrædnaði eitt sindur, soleiðis at gestirnir vunnu seg framum.
Og teirri leiðsluni sleptu tær bláu ongan tíð. Munurin varð støðugt hildin um tey fýra málini ella har á leið, og seinastu løtuna settu Neista-kvinnurnar trumf á. Trý mál á rað tóku fullkomuliga luftina úr heimaliðnum, og so bilti tað minni, at VB aftur pyntaði um úrslitið móti dystarenda.

### Fakta

**VB-Neistin 21-25 (11-14)**
**10 min:** 5-4
**20 min:** 8-10
**40 min:** 13-17
**50 min:** 17-21
**Málskjúttar**
**VB:** Sára Samuelsen 6(1), Teresa Joensen 4, Andrea Nielsen 4, Bára Mortensen 3, Svava Vestergaard 2, Sólrun Winther 2
**Neistin:** Jacklin Durhuus 6, Rakul Augustinussen 6(1), Katrin á Neystabø 3, Anja Heinadóttir 3, Louisa Andreasen 3, Anna Clementsen 2, Bára Danielsen 1, Marjun F. Danberg 1
**Brotskøst:** VB 4, Neistin 1
**Útvísingar:** VB 1, Neistin 1
**Dómarar:** Birgir Sondum & Geir Wardum

### Hondbóltsstøður

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 33 | 19 | 14 | 2 |
| 2 Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 25 | 21 | 4 | 2 |
| 3 Tjaldur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 StÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 VB | 1 | 0 | 0 | 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 6 VÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 19 | 33 | -14 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 32 | 25 | 7 | 2 |
| 2 VÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 29 | 23 | 6 | 2 |
| 3 Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 27 | 26 | 1 | 2 |
| 4 H71 | 1 | 0 | 0 | 1 | 26 | 27 | -1 | 0 |
| 5 KÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 23 | 29 | -6 | 0 |
| 6 Kyndil | 1 | 0 | 0 | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |